Sosialurin

# VARPIÐ

FRÍGGJADAGUR 13. oktober 2006



**The NeverEnding Story**

Bastian syrgir um missin av mammuni, meðan strangi pápi hansara kærir sína neyð um dagdroymaríið hjá soninum. Og sum um tað ikki var nóg mikið, so verður Bastian eisini happaður í skúlanum. Ein dagin ger hann tó av at skulka, og fer heldur í ein gamlan bókahandil. Og á loftinum í hesum finnur hann eina gamla bók um óendaligu søguna.

**Sunnudagin kl. 15.00**

**QTV**

Hvør sigur, at konufólk skulu vera høg og kløn? Og ber tað til at fáa leiklutirnar sum yrkiskvinna, mamma og elskarinna at rigga saman? Er tann perfekta kvinnan yvir høvur til. QTV er nýggja talk-showið á Kanal4, og er tað Pernille Aalund, sum er vertur. Hon ger upp við vanahugsan um ljósareyðar dreymatilverur, tí so einfalt er lívið ongantíð. Hinvegin ber til at fáa góð ráð um, hvussu lívið kann verða betri, og tað er tað, sum Pernille ger í samstarvi við kvinnublaðið Q og alnetisportalin, oestrogen.dk.

**Sunnudagin kl. 21.55**





**Be Cool**

Chili Palmer kann saktans nýta sínar gomlu gangstara-metodur, tá hann skal hjálpa einkjuni hjá myrda vini sínum við at fáa plátufelagið at koyra. Í uppfylgjaranum hjá Get Shorty skal hann stríðast við bæði russisku mafiuna og fyrilitarleysar hip-hop-framleiðarar.

Mánadagin kl. 11.20

TV Televarpið

Fleiri rásir - einki roks

Filmir í hópatali • Barnasendingar • Dokumentar • Náttúra • Tíðindi alt samdøgrið